# Sosialráðgevi/ Sosialformidlari

## til Barnaverndar-tænastuna í Suðuroy

Í sambandi við at kommunurnar hava yvirtikið barnaverndarøkið, er eitt fulltíðarstarv ella 2 parttíðarstørv sum sosialráðgevi/sosialformidlari í barnaverndarumsitingini i Suðuroya øki leyst at seta skjótast gjørligt.

Barnaverndarumsitingin heldur til á ráðhúsinum í Tvøroyrar Kommunu og skal fyribils virka við tveimum fólkum. Uppgávurnar verða at røkja barnaverndarmál, gomul eins og nýggj, innan fyri rammurnar í barnaverndarlógini.

**Vit vænta at tú:**
- Hevur viðkomandi útbúgving ella royndir frá arbeiði við málsviðgerð í eini almennari fyrisiting.
- At tú er fleksibul og er góð/ur at samstarva við.
- At tú er ábyrgdarfull/ur, kann arbeiða sjálvstøðugt og móti einum úrsliti.
- At tú hevur yvirblikk og ein professionellan hugburð til tey mál, tú arbeiðir við.
- At tú er nærverandi og hevur umsorgan fyri tørvinum hjá tí einstaka barninum.
- Innlit í og royndir við barnaverndararbeiði er ein fyrimunur, men ikki eitt krav.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og umskiftiligt arbeiði.
- Avgerðarheimild í størri mun.
- Møguleika fyri flekstíð og at arbeiða heimanífrá.
- Løn við útgangsstøðið í tínum førleikum og galdandi sáttmála við viðkomandi felag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda seg til leiðaran á Barnaverndarumsitingini á tel: 371085 ella teldupost: susanne@tvoroyri.fo

Umsókn við viðkomandi prógvum verður at senda til:

**Tvøroyrar Kommuna**
Postboks 80
FO 800 Tvøroyri

**Mrk.: Starv barnaverndarumsitingin**

**Umsóknarfreist:** týsdagin tann 31. januar 2006.
Í umsóknini verður viðmerkt um ynskt verður fulltíðar- ella parttíðarstarv.

**Frá Sunda kommunu**

# Pedagogur

## til Dagstovnin á Flatinum

Søkt verður eftir einum pedagogi 30 tímar um vikuna til frítíðarstovuna á Bakka, at byrja 13. februar ella eftir nærri avtalu.

Her ganga 80 børn í aldrinum 0-10 ár: 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 frítíðarstova. Vit eru 20 starvsfólk við pedagogum á hvørjari stovu, men vit mangla ein pedagog á Bakka. Tí søkja vit eftir einum ágrýtnum, sjálvstøðugum og álítandi persóni við góðum samstarvsevnum.

**Um stovnin:**
Stovnurin, sum bert er 1/2 ára gamal, hevur alt sum ein nútímans dagstovnur skal hava. Hvør barnastova er ein sjálvstøðug, vælútgjørd eind við egnari inngongd, umframt eitt stórt felagsrúm, viðtaluhøli/serstova og ymisk verkstøð.
Økið uttanfyri er stórt við nógvum møguleikum, og stovnurin liggur sera væl fyri, beint við haga og fjøru, bussambandi, fimleikarhøll og svimjihøll.

**Vit kunnu bjóða**
eitt áhugavert starv, har tú saman við øðrum pedagogum og hjálparfólkum fært møguleika fyri at byggja upp eitt spennandi pedagogiskt umhvørvi á einum nýggjum stovni.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 13. februar ella eftir nærri avtalu. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at tosa við Rosu Prestá leiðara á tlf. 471030/227852 ella Sólrún Dam varaleiðara á tlf. 471034.

**Umsókn**
saman við avriti av prógvum og viðmælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 25. januar 2006 og sendast til:

**Dagstovnurin á Flatinum**
**Skúlavegur 9**
**400 Oyrarbakka**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4132**
**Navn:** Sp/f Fixit
**Adressa:** Reyðagøta 3 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 05-01-2006
**Viðtøkudato:** 05-01-2006
**Stovnarar:**
Frank Jóhan Dam, Kongsgil 21, 100 Tórshavn
Friðleivur Kjærbæk, Reyðagøta 3, 100 Tórshavn
**Stjórn:**
Friðleivur Kjærbæk, Reyðagøta 3, 100 Tórshavn, (stjóri)
Frank Jóhan Dam, Kongsgil 21, 100 Tórshavn, (stjóri)
**Grannskoðari:**
Óli Regin Hansen skrásettur grannskoðari, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn
**Partapeningur:**
kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjórunum.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handverk, handil, ídnað og annað starv í hesum sambandi.
**Roknskaparár:**
01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:**
05.01.2006 - 31.12.2006

*Skráseting Føroya tann 09. januar 2006*

*Kristin Balle*

## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 10. februar 2006, kl. 13.00,** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin **tvingsilssøla** yvir **ognina matr. nr. 282, Froðba, liggjandi á Tvørabakka á Tvøroyri (AS nr. 2-36/2005).**

Sambært tryggingarskjalinum er talan um eini eldri sethús við laðari/stoyptari grund, klødd við timbri og takt við aluminium. Bygda økið er 81 kvm., ið er í trimum hæddum. Sambært tingbóksattestini er økið, húsini standa á, 161 kvm. til víddar.

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:
Miðhæddin: Køkur og spísikamar, stova, inngongd við trappu uppá loft.
Loftshæddin: Gongd, 4 kømur og baðirúm við toiletti, hondvaski og brúsu.
Kjallarin er óinnrættaður og er ikki í fullari innrættingarhædd. Ognin er útleigað.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4714601)** ið kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
tann 9. januar 2006

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3575,**
Sp/f H F S, 700 Klaksvík.
**Viðtøkur broyttar:**
04.11.2005
**Partapeningur:** Hækking við kr. 325.000,00 til kr. 525.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kr. 325.000,00 við skuldarumskifti til kurs 200.

*Skráseting Føroya tann 09. januar 2006*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3818,**
P/F 15.juni 2004, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Bogi Jacobsen, Miðrás 5, 100 Tórshavn
**Innkomin sum stjóri:** Johan Nolsøe Djurhuus, Korkagøta 4, 100 Tórshavn

*Skráseting Føroya tann 09. januar 2006*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 14,**
Sp/f 14, 110 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:**
16.09.2005.
**Partapeningur:** Lækking við kr. 132.500,00 til kr. 467.500,00 til útgjaldingar til kurs 38.600 er nú endalig.
**Kapitalur:** Kr. 476.500

*Skráseting Føroya tann 09. januar 2006*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3636,**
Sp/f Friomar, 650 Toftir.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:**
Marjun Olsen, 656 Saltnes
**Innkomin sum stjóri:**
Johannus M. Olsen, 655 Nes, Eysturoy

*Skráseting Føroya tann 09. januar 2006*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3789,**
Sp/f JUJECO, 100 Tórshavn.
**Nevnd: Farin úr nevndini:**
Ulrik Jensen, Kongshøjvej 25, 9210 Ålborg SØ (nevndarlimur)
Jesper Engedal, Reyngøta 26, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
**Innkomin í nevndina:** Tove Gunhild Engedal, Risumvej 41, 8600 Silkeborg (nevndarformaður)
Svend Aage Jensen, Pilgårdsvej 1, 7742 Vesløs (nevndarlimur)
**Farin frá sum nevndarformaður:** Rudolf Engedal, Risumvej 41, 8600 Silkeborg
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Jesper Engedal, Reyngøta 26, 100 Tórshavn
**Innkomin sum stjóri:**
Rudolf Engedal, Risumvej 41, 8600 Silkeborg

*Skráseting Føroya tann 09. januar 2006*

*Kristin Balle*

veitst tú ikki tað?